# Beach Party á Gøtusandi



Mynd: Ólavur Frederiksen

## Lønin er ein fríbilett

Við eina inngongd til sjálvt G!-økið stendur 18 ára gamla Birita í Dali úr Havn á varðhaldi. Øll, sum koma inn á økið, skulu vísa sítt armband, og summi mótmæla, tá Birita noktar teimum at taka rúsdrekka við inn á økið.

- Jú jú, tað kann vera nakað "ótakknemligt" at vera vaktur, tí allir gestirnir hava ikki eins lætt við at góðtaka reglurnar, sigur Birita. Hetta er triðja árið, at Birita er hjálparfólk á festivalinum, og í ár arbeiðir hon fýra tímar hósdag og fríggjadag og tveir tímar leygardag. Men hví velur hon at hjálpa til?

- Lønin er ein fríbilett, men umframt at spara eitt sindur av peningi vil eg fegin stuðla tiltakinum við at arbeiða, tí eg meti, at G! festivalurin er eitt sera gott tiltak. So eg standi gleðiliga og taki ímóti eitt sindur av hvørjum frá ymsu gestunum, sigur Birita við einum smíli.

HíS



## Hestar til børn og fullar menn

21 ára gamla Turid Poulsen skipaði fyri hestaríðing fyri børnini á ársins G! Festivali. Hetta er annað árið á rað, at Turid tekur sær av ríðing á G! Festivalinum, og millum hestar og spent børn forstýraðu vit hana eina løtu.

- Eg havi verið til arbeiðis frá klokkan trý og skal arbeiða til klokkan seks í dag, og í morgin arbeiða vit frá tvey til seks, segði Turid fríggjadagin um fýra-tíðina. Seks hestar eru til taks fyri mongu og spentu børnini, og sjálv eigur Turid fýra av teimum seks, sum hon hevur tikið við sær til Syðrugøtu úr Havn.

- Áhugin tykist vera sera stórur. Tað er so at siga eingin løta uttan kundar, og millum mongu børnini vilja summir fullir menn eisini sleppa ein túr, sigur Turid flennandi.

HíS

## Ov vánaligt telesamband

Millum mongu G!-gestirnar funnu vit Høgna Reistrup, sum tók sær av løttum uttanfyri eitt tjald. Høgni hevur fyrr gjørt um seg sum forsangari í populera Prix-bólkinum Lawetz, og sum so mong onnur var Høgni avgjørdur, tá vit spurdu um ymsu bólkarnar á festivalinum.

- Kaizers Orchestra vóru størsta og besta navnið á ársins festivali, eingin ivi um tað. Teir er mangan trupult at liva upp vil tað, fólk vænta av einum so stórum bólki, men teir livdu 100% upp til allar vónir, slær Høgni fast.

Sjálvur var Høgni til arbeiðis saman við parti av SvF-manningini onkran av døgunum, so hann fekk ikki møguleikan til at hoyra alt, sum hann fegin vildi. Men umframt Kaizers Orchestra var tað serliga ein bólkur, sum fangaði fyrrverandi forsangaran.

Íslendsku Valravn vóru góðir og yvirraskaðu meg positivt. Stuttligt, at slíkir heldur ókendir bólkar eisini kunnu ríka um upplivingina, sigur Høgni, sum metir skránna á ársins G! festivali vera góða.

- Men her er altso ov vánaligt telesamband. Tað er nakað, fyrireikararnir kundu rættað uppá til næsta festival, sigur Høgni við einum smíli.

HíS